# kka alment tikið í nýtslu



Nevndin í Bátafelagnum á Bakka, f.v.: John Tórður Sigurðsson, Allan Poulsen, Hanus Lamhauge og Atli Leitisstein. Janus Knudsen vantar á myndini

Mynd: Vilmund Jacobsen

– Nú felagshúsið alment er tikið í nýtslu, fara vit at finna út av eini skipan.

Spurdir, um ætlanin er at skipa fyri ymiskum tiltøkum, siga teir, at hugskotini, sum frammi hava verið, eru mong, og sum frá líður vænta teir, at ymiskir aktivitetir fara at vera í hølunum niðri á Støð.

– Nú eru vit so komnir har til, at felagshølið er liðugt, og húsið kann brúkast, sum tað er.

Nevndin í Bátafelagnum á Bakka er sera takksom fyri tað arbeiðið, sum limirnir hava gjørt – og teir eru sera takksamir fyri allan tann stuðul, sum fyritøkur og stovnar hava veitt teimum.

– Hetta er ein góður karmur um felagsvirksemið, og vit vóna, nú umstøðurnar eru komnar upp á pláss, at uppaftur fleiri báteigarar og bátaáhugað koma við í felagið, siga teir.

### Bøttar umstøður

Teir fegnast eisini um, at umstøðurnar hjá báteigarum á Bakka eru vorðnar betri, síðan Bátafelagið fór undir sítt virksemi.

– Vit hava fingið atløgubryggju í bátahylinum, og vit hava fingið el og vatn. Vit hava eisini fingið oljupumpu, so bátar kunnu taka olju. Hetta eru stór framstig.

Teir kundu kortini hugsað sær, at atløgumøguleikarnir gjørdust uppaftur betri, tí tað er ov trongligt, tá ið fremmandir bátar eru á vitjan.

– Vit kundu hugsað okkum at skipað fyri ymiskum tiltøkum, har báteigarar og bátahugað vitja okkum. Tí kundu vit hugsað okkum, at umstøðurnar í bátahylinum á Bakka gjørdust uppaftur betri, siga nevndarlimir í Bátafelagnum á Bakka.

## – Eg eri ógvuliga spentur

**Rógvi Reinert kemur at kalla beinleiðis úr vinnuni – og ikki úr ”pappírsveldinum”**

STARV

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nýggi aðalstjórin í Fiskimálaráðnum eftir Herálv Joensen, sum er vorðin sendimaður í Keypmannahavn, verður Rógvi Reinert, ið er útbúgvin fiskivinnukandidatur, sum tað eitur. Hann tekur við starvinum, 1. februar.

Síðan Rógvi varð liðugur við sína útbúgving á Universitetinum í Tromsø í Noregi í 1992, hevur hann starvast sum virkisleiðari og stjóri innan flakavinnu og fiskaútflutning.

Vit kunnu tískil siga, at nýggi aðalstjórin kemur at kalla beinleiðis úr vinnuni – og ikki úr ”pappírsveldinum”.

Síðan miðskeiðis í fjør hevur Rógvi havt starv sum fulltrúi í Fiskimálaráðnum.

Rógvi Reinert er 42 ára gamal, nú hann tekur við starvinum sum aðalstjóri í Fiskimálaráðnum.

### Ógvuliga spentur

Enn hevur hann ikki tikið við starvinum, og tí hevur hann heldur ikki hug at gera tær nógvu viðmerkingarnar til uppgávurnar, sum liggja fyri framman.

Rógvi Reinert dylir kortini ikki fyri, at hann tekur við avbjóðingini við lív og sál.

– Jú, eg eri ógvuliga spentur upp á hesa uppgávu, sigur nýggi aðalstjórin í Fiskimálaráðnum.



*Nýggi aðalstjórin í Fiskimálaráðnum, Rógvi Reinert, er 42 ára gamal*